


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 04 - 2012

# Savna fleiri upplýsingar um Barentshavið

Fyrrakvøldið fór norska oljustýrið undir at savna fleiri upplýsingar um landssynningspartin av Barentshavinum. Talan er um seismiskar kanningar, og og úrslitið verður partur av grundarlagnum, tá myndugleikarnir skulu taka støðu til, um teir skulu loyva olju- og gassvirksemi í økinum. Lars Jensen, sum stendur fyri teimum nýggju kanningunum vegna oljustýrið, sigur, at teir fyrstu fimm tímarnar gjørdi rannsóknarskipið M/V Artemis Atlantic kanningar eftir einari næstan 35 fjórðingar langari linju, og at hetta var ein sera góð byrjan. Ætlanin er, at tað skal taka millum seks og átta vikur at gera kanningarnar, og kanningarleiðin er um 3300 fjórðingar. Neyvari enn í fjør Norska oljustýrið gjørdi eisini seismiskar kanningar í landssynningspartinum av Barentshavinum seinasta summar. Lars Jensen sigur við Aftenbladet, at ta ferðina var talan um eina heildarkanning, men at hesaferð snýr tað seg um meiri nágreiniligar kanningar, og at upplýsingarnar skulu kunna brúkast í sambandi við møguliga útbjóðing. Í oljustýrinum halda tey ikki, at tær seismisku kanningarnar fara at órógva fiskiskip, tí hesa tíðina á árinum eru tað fá skip, sum royna so langt úr landi. Hetta eru ikki tær einastu seismisku kanningarnar, sum norska oljustýrið fer at gera í Barentshavinum í summar. Seinni fer stýrið at skjóta seismikk eftir einari 17.000 fjórðingar langari linju í Barentshavinum, nærhendis Jan Mayen og úti fyri Norðurnoregi.